## Tvær prestavígslur í einum

Tá kirkjuklokkurnar kalla til gudstænastu kl. 12 sunnudagin Hvalba, verður talan um eina serstaka gudstænastu. Í fyrsta lagi verða tveir prestar vígdir sum slíkir, og har annar teirra samstundis verður innsettur sum prestur. Talan er um teir báðar Hanus Simonsen sum skal virka sum prestur í vestaru kirkjusóknini í Suðurstreymoy og Símun Jacobsen, sum skal virka sum prestur í norðaru helvt av Suðuroynni. Símun verður bæði prestvígdur og innsettur í prestagerning sín við hesa gudstænastuna. Hanus hinvegin verður innsettur sum prestur einaferð seinni, helst sunnudagin 19. august. Hetta eru samstundis fyrstu prestarnir, ið verða prestvígdir og innsettir í nýggju føroysku fólkakirkjuni. Eftir gudstænastuna verður døgurði fyri innbodnum.



## Reggae endurnýggjar sálmabókina

Tveir av heimskendu reggae-legendunum úr Jamaica, Bob Marley og Peter Tosh, fáa nú pláss í sálmabókini í anglikansku kirkjuni. Báðir vóru sannførdir Rastafarianarar, sum viðurkenna seg til kristna trúarsamfelagið, og sum eftirkomarar av afrikansku trælunum stovnsettu. Tvey av verkum teirra, "One love" hjá Marley og "Psalm 27" hjá Tosh eru í fyrstu syftu skotnir upp at koma við í nýggju sálmabókina. Tað eru tó ikki øll, ið eru eins fegin um hetta, tí tekstirnir hjá hesi rørsluni vóru mangan atfinningarsamir til kirkjuna. Onnur siga kortini, at teir hvørki eru ímóti Gudi ella religión. Bæði Marley og Tosh doyðu í 1980'unum.

# At geva og at fáa

**Kl. 18 í gjárkvøldið legði trúboðaraskipið Logos II at landi á Tvøroyri. Stór móttøka var á bryggjuni, har millum annað Jóannes Eidesgaard, løgmaður helt røðu. Hann fegnaðist um, at fleiri føroyingar eru millum ta 180 mans stóru manningina, sum kemur úr 40 londum**

TRÚBOÐAN
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Tvøroyri:** Hetta er fyrstu ferð, at Logos II vitjar í Suðuroy, og tí var gjørt nógv burtur úr móttøkuni.

Í hesum sambandi var løgmaður boðin at halda røðu, sum ein part av tiltakinum.

Hann fegnaðist um, at tey júst høvdu valt Tvøroyri, sum jú er heimstaður hansara, til vitjanina hesaferð. Fyri mongum árum síðani var støðan hon, at skip í hundraðtali sóust á fjørðinum, men soleiðis er ikki í dag. Hinvegin, - í gjárkvøldið kom so enn eitt skip, við heilt øðrum innihaldi.

- Endamálið við arbeiði tykkara er ein synergi av at geva og at fáa, segði løgmaður í røðu síni.

Hann vísti á, at manningin hevur eina vitan, sum tey fegin vilja geva øðrum, eisini føroyingum hesar komandi dagarnar.

- Orðið – Logos – er millum annað borið út við bókum tykkara við kristna gleðiboðskapinum til fólk kring allan heimin.

- Okkara ynski er tí, at tey orðini, sum tit bera við tykkum, mugu geva vitan, hjálp og vón til at fullføra visjónina um at ávirka lívið hjá hvørjum einstøkum vitjandi, segði løgmaður millum annað í røðuni.

### Vitja samkomur

Tað er felagsskapurin Operation Mobilisation (stytt: OM) ið eigur hetta skipið. Hetta er sami felagsskapur sum eigur gomlu Norröna.

Nú Logos II er í Føroyum verður ein hópur av tiltøkum í Suðuroynni um vikuskiftið.

Manning av skipinum fer millum annað at luttaka við eitt møti, sum verður kl. 18 sunnukvøldið í missiónshúsinum á Tvøroyri, eins og tey luttaka við tað evangeliska møtið kl. 18 í samkomuhúsinum Bethel í Vági.

Høvið verður eisini hjá fólki at vitja umborð á skipið, har tey fáa rundvísing í skipinum.

Samstundis er høvið hjá teimum at vitja ta størstu bókasøluna, sum hevur verið her á landi, eins og møguleiki er at keypa sær ein drekkamunn á eini altjóða kaffistovu umborð.

Logos II verður liggjandi til mánadagin, tá leiðin verður løgd til Íslands.



*Løgmaður beyð Logos II vælkomin til Tvøroyrar, og vónaði at manningin og tey vitjandi fingu nógv burtur úr*

*Mynd: Bjarni Nygaard*



*Størsta bókasølan í føroyskum sjógvi finst umborð á Logos II. Higar leitaðu fólk sær í hópatali*

*Mynd: Bjarni Nygaard*



*Logos II steðgar her til mánadagin, tá kósin verður sett móti Íslandi*

*Mynd: Bjarni Nygaard*